## Shearer favorittur í Newcastle

Í eini atkvøðugreiðslu hjá Skysports er Alan Shearer favorittur til at gerast nýggjur venjari hjá Newcastle. Kevin Keagen rýmdi herfyri úr felagnum eftir ósemju við nevndina, og síðani hevur Chris Houghton verið fyribils venjari. Tað sigst, at átta venjarar longu hava sagt nei til Newcastle, og tað hevur sett Shearer í eina enn sterkari støðu.



## Mourinho nakað er serligt

Hann varð kallaður The Special One í enskum fótbólti, og mikukvøldið kann hann gerast nakað serligt í italskum fótbólti. Mourinho hevur ikki tapt 99 heimadystir á rað sum venjari, og mikukvøldið kann hann runda teir 100 dystirnar uttan tap, tá ið Inter fær vitjan av Leece í Seriu A. Av teimum 99 heimadystunum hevur Mourinho vunnið 83.

NSÍ-B36 1-0 (0-0):

# B36 fær ikki bilbukt við meist- ararnar

**Tað varð leitað eftir yvirskotinum mest sum alla tíðini, tá ið NSÍ við teprum sigri á árstalsfelagnum styrkti um sína støðu í kappingini um næstfínastu krónurnar**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

*NSÍ*

*B36*

Líkindini vóru fín, og stigatalvan boðaði frá, at tað vóru tvey av teimum bestu liðunum og harvið nógvir av bestu spælarunum í landinum, sum vóru á vøllinum við Løkin í Runavík.

Men í longum løtum var spælið ikki serliga polerað. Sendingarnar vóru ikki altíð so neyvar, avgerðirnar ikki altíð tær skilabestu, og flytingarnar vóru ikki so nógvar og skjótar, sum spælararnir á hesum báðum liðunum so ofta áður hava víst.

Kappingarárið er farið at halla. NSÍ og B36 vóru leingi gullkandidatar. Bæði feløgini hava síðstu árini vunnið nógv, og tí telur tað næstbesta als ikki so nógv, sum tað ger at vinna sjálvan tindin.

Hetta mundu vera orsøkir til, at poleraða fótbóltsspælið ikki gjørdist tað, sum tað kundi verið roknað við, tá ið tvey tey bestu liðini brustu saman. Viljin var góður, men yvirskotið at útinna tað, sum ætlanin heilt víst hevur verið, var ikki so stórt, sum tað plagar at vera. Kanska sinniliga og likamliga møðin er farin at spøkja eftir nógva og intensa venjing í skjótt tíggju mánaðir.

Áskoðararnir vórðu hildnir á pínubeinkinum alla tíðina. Bara eitt mál varð skorað, og tað var heimaliðið, sum átti tað. Málskjútti var sera arbeiðssami Hjalgrím Elttør, sum var púra leysur, tá ið hann við innaru síðuni setti bóltin framvið Meinhardi Joensen í B36 málinum, eftir at Karoly Potemkin hevði verið við í uppspælinum.

Potemkin hevði fleiri ferðir góðar møguleikar at skjóta mál, men hann var ikki neyvur, og í onkrum støðum hevði tað ivaleyst verið møguleiki fyri, at tað spurdist meiri burturúr, um hann heldur hevði valt uppaftur leysari viðspælarar.

Serliga í 1. hálvleiki hekk spælið ikki serliga væl saman. B36 legði bragdligari fyri, og í 1. hálvleiki spældu teir seg fleiri ferðir ígjøgnum í vinstru. Men álopstyngdin hjá teimum var ikki stór. Sam Malsom var einsamallur heilt á toppinum, meðan Ingi Højsted var á sentrala miðvøllinum saman við Róaldi Jacobsen og liðformanninum Klæminti Matras.

Í 2. hálvleiki var heilt øskukalt hjá gestunum, B36 uppspælið var ofta fram eftir miðásinum, og tað bar fleiri ferðir við sær, at NSÍ miðvøllurin vann bóltin av teimum, og so gekk tað skjótt móti málinum hjá Meinhardi Joensen. Tað var júst ein sovorðin støða, sum bar við sær, at B36 lítið korter undan leikloki misti ein mann. Liðformaðurin, Klæmint Matras, fekk í eitt sindur kroystari støðu mitt á bóltin fram frá miðverjuni. Teir gulu struku avstað við bóltinum, og haldaragjaldið var fríspark. Gula kortið var á lofti, og tá ið stríðsmaðurin longu eina ferð frammanundan hevði sæð tann litin, noyddist hann av vøllinum.

Sum 2. hálvleikur leið, hevði NSÍ væl betri tak á tí. B36 flutti miðverjan Dimitrij Jankovic fram í álopið, uttan at tað gjørdist vandamikið. Einasta veruliga B36 royndin var langskot frá Magnusi Olsen, sum brast í tvørtræið aftanfyri Tórð Thomsen, sum hevði lítið at gera. Heima yvirvágin bar tó ikki fleiri mál við sær. Tá ið Lars Müller bríksladi fyri síðstu ferð, var heimafagnaðurin stórur.

NSÍ liggur væl á silvurkósini, meðan teir í B36 fyri aðru ferð í ár fóru vónbrotnir av vøllinum við Løkin. Á eystanstevnu taptu teir 3-1, og heldur ikki á heimavølli hevur tað í ár eydnast at vinna fulla úrtøku ímóti NSÍ. Tá ið teir gulu vitjaðu í Gundadali, var úrslitið 1-1!

- Vit fegnast um sigurin. Í 2. hálvleiki var hugburðurin fínur. Tað er hann, sum vit skulu halda fast um, staðfesti liðformaðurin, Óli Hansen, sum saman við landsliðsspælaranum Jóhan Troest Davidsen hevði havt gott tak á einsamalla B36 álopsspælaranum. Óli plagar at taka ein dyst í senn. Næstu ferð verður tað oddaliðið EB/Streymur, sum fer at vitja við Løkin!



*Heldur ikki hesa ferð fekk B36 nakað við sær úr Runavík. Í teimum trimum dystunum, sum liðini hava spælt, hevur B36 bert vunnið eitt stig*

*savnsmynd*

### Skarprætt- arin restar

B36 venjarin, Heðin Askham, staðfesti eftir dystarlok, at tað ikki hevði verið nóg gott hjá hansara monnum. Hann segði seg vera nøgdan við 1. hálvleik, meðan tað eftir steðgin als ikki var, sum tað átti at havt verið:

- Vit saknaðu Jákup á Borg. Tá ið hann er inni, spæla við 4-4-2. Í dag var Sam einsamallur á toppinum. Hann megnar sjálvur at skapa sær tveir upplagdar møguleikar, sum tíverri ikki bera mál við sær. Um teir høvdu givið mál, so hevði talan verið um heilt øðrvísi fyritreytir fyri seinna umfari, heldur B36 venjarin, sum fleiri ferðir áður hevur víst á, at teir í B36 resta mannin, sum kann skjóta mál.

B36 hevur skorað 26 mál, meðan liðini, sum teir kappast við, hava skorað væl fleiri – EB/Streymur 45, NSÍ 35, HB 47 og Víkingur 37. Eisini ÍF (28) og KÍ (27) hava skorað fleiri mál enn B36.

Ingi Højsted fór av vøllinum, tá ið tað restaði ein lítil hálvur tími. Orsøkin var tann, at miðvallarin aftur hesa ferð hevði trupulleikar við knænum.

### Úrtøkan er góð

Í NSÍ leguni var hýrurin góður, eftir at tað fyri aðru ferð í ár hevði eydnast at vinna fulla úrtøku ímóti B36.

- Í summar gekk tað einki serligt. Nú hava vit vunnið fýra av fimm teimum seinastu ferðunum, og tað var fínt, at tað eydnaðist at rætta upp aftur, eftir at vit taptu í Gøtu, var staðfestingin.

Málverjin, Tórður Thomsen, var fegin um, at tað hevði eydnast at halda B36 burtur frá at skjóta mál:

- Eg hevði ikki so nógv at gera hesa ferð. Serliga í 2. hálvleiki var verjuspælið frammanfyri meg gott. Nú verður spennandi at fáa EB/Streym á vitjan. Vit ætla ikki, at teir skulu vinna meistaraheitið við Løkin!